## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Stjóraskifti hjá Farodane

**Tíðindaskriv**

Í samband við at stovnarin av Farodane, Carl Herup Olsen, ið eisini var nevndarformaður í felagnum, doyði fyri hálvum ári síðan, er leiðslan í felagnum nú umskipað. Stjórin í Farodane í 22 ár Ólavur Herup Olsen hevur ynskt at geva stjórastarvið frá sær og í staðin taka við sum arbeiðandi nevndarformaður.

Sum nýggjan stjóra í Farodane hevur felagið sett Rolf Herup Olsen. Rolf er havnarmaður, føddur í Tórshavn 3.12.1967 og er sonur Martinu Jakobsen og Ólavur Herup Olsen. Rolf er sostatt triðja ættarlið sum tekur yvir leiðsluna av Farodane.

Eftir fólkaskúlan tók Rolf studentsprógv í Hoydølum í 1987. Tók HH á Handilsskúlanum í Havn í 1989 og fór sama árið í bankalæru í Sjóvinnubankanum, har hann var í 3 ár. Í 1992 byrjar Rolf at lesa data og økonomi á Handilsháskúlanum í Kbh., har hann í 1998 tekur prógv sum cand.merc.dat. Flytur heimaftur sama árið og byrjar at arbeiða á Farodane, har hann seinastu árini hevur staðið fyri leiðsluni og menningini av KT-deildini.



*Feðgarnir Ólavur og Rolf Herup Olsen*

Nevndin metir, at Rolf við síni útbúgving og starvsroyndum sum barlast, hevur nomið tann fakliga og menniskjaliga førleika, umframt ta álit bæði millum starvsfólk og kundar, sum krevst fyri at taka yvir, menna og leiða fyritøkuna framá.

Farodane rekur eisini handilin Farodane City og skeiðstovuna Kvasir. Tað starvast tilsamans 48 fólk í fyritøkuni í dag.




MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin


# 25 prosent fleiri persónbilar

**Sølan av nýggjum persónbilum vaks við 25 prosentum fyrstu fimm mánaðirnar í ár í mun til sama tíðarskeið í fjør. Samlaða sølan av nýggjum akførum er vaksin við 13 prosentum**

**Bilhagtøl**

Í nýggjasta tíðindaskrivinum frá Bileftirlitinum sæst, at sølan av nýggjum persónbilum fyrstu fimm mánaðirnar í fjør er vaksin við 25 prosentum í mun til í fjør. Frá januar til og við mai í fjør vórðu seldir 448 persónbilar í mun til 561 í ár. Samlaði vøksturin var upp á góð 13 prosent.

**Tíðindaskriv**
*Bileftirlit Føroya*

**Hagtøl fyri skráseting av nýggjum akførum fyri JAN-MAI í 2005 og 2004**

| Akfaraslag | Mai 2005 | Mai 2004 | Broyting Mai 05/04 | Jan-Mai 2005 | Jan-Mai 2004 | broyting 2005/2004 | %broyting 2005/2004 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Brandbilar | 0 | 1 | -1 | 0 | 1 | -1 | -100,00% |
| Bussar | 2 | 0 | 2 | 2 | 1 | 1 | 100,00% |
| Kampingvognur | 0 | 1 | -1 | 0 | 1 | -1 | -100,00% |
| Hýrubilar | 0 | 7 | -7 | 2 | 16 | -14 | -87,50% |
| Lastbilar | 3 | 0 | 3 | 8 | 7 | 1 | 14,29% |
| Leguvognar | 3 | 0 | 3 | 3 | 0 | 3 | |
| Motorsúkkla | 1 | 2 | -1 | 3 | 6 | -3 | -50,00% |
| Neyðsendakfar | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 0 | 0,00% |
| Persónbilar | 166 | 113 | 53 | 561 | 448 | 113 | 25,22% |
| Smábussar | 0 | 0 | 0 | 3 | 2 | 1 | 50,00% |
| Tangabilar | 0 | 0 | 0 | 3 | 0 | 3 | |
| Viðfestivognar | 8 | 15 | -7 | 28 | 44 | -16 | -36,36% |
| Vøruvognar | 18 | 11 | 7 | 73 | 79 | -6 | -7,59% |
| **Samlað** | **201** | **150** | **51** | **687** | **606** | **81** | **13,37%** |

Í mai 2005 eru skrásett 47 nýggj prutl og higartil í ár eru skrásett 164 nýggj prutl.

